Álit

í

løgtingsmáli nr. 104/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin) (§ 154b frádráttur)

Jørgen Niclasen, løgtingsmaður, hevur vegna Fólkaflokkin lagt málið fram 7. mars 2024, og eftir 1. viðgerð 21. mars 2024 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 2., 18. og 23. apríl og 1. mai 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Áhugafelagið Antares, Føroyskar Fiskimenn Uttanlands, landsstýriskvinnuna í heilsumálum, Margit Stórá, saman við Heilsutrygd, og í tveimum umførum landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, saman við TAKS.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eyðgunn Samuelsen, Bjarni Hammer, Eirikur í Jákupsstovu og Hanna Jensen) hevur hesar viðmerkingar:

Greiða útgangsstøðið, og tað okkara heilsutrygdarskipan byggir á, er, at øll, sum búgva í Føroyum, rinda inn til Heilsutrygd.

Hetta hevur støðan verið heilt aftur til sjúkrakassatíðina.

Nú hevur tað víst seg, at rættarstøðan í Føroyum er øðrvísi enn flestu aðrastaðni við tað, at § 55 í stýrisskipan Føroya av Føroya Rætti er mett at hava við sær, at borgarar kunnu krevja frítøku fyri heilsutrygdargjald vísandi til norðurlendska sáttmálan um sosiala trygd, sjálvt um hetta gongur ímóti tí løgtingslóg, sum er samtykt í Føroyum. Sambært Føroya Rætti verður hetta millum annað bygt á, at Føroya Kærustovnur hevur tulkað rættarstøðuna soleiðis.

Orsakað av hesum dómi er eitt uppskot í løtuni í Løgtinginum, har lagt verður upp til, at tey, ið rinda til líknandi sosiala skipan aðrastaðni skulu kunna søkja um frítøku fyri Heilsutrygdargjald, meðan atgongdin til tænastur frá Heilsutrygd ikki verður skerd.

Hetta uppskotið snýr seg hinvegin um at endurskapa skattafrádráttin í § 154 b í skattalógini, sum varð strikaður í samband við skattaumskipanina á heysti 2023 við ásannan av, at eitt uppskot um frítøku fyri Heilsutrygd fór at koma í tingið í vár.

Avleiðingin, um bæði uppskotini verða samtykt er, at tey, ið rinda til skipanir líknandi Heilsutrygd í øðrum londum, og sum fáa fulla tænastu úr hesum, kundu fingið skattafrádrátt fyri hetta gjald, og sostatt einans høvdu skula rindað fyri Heilsutrygd í Føroyum, sum tey eisini høvdu fingið fulla tænastu úr.

Skipanin í Folketrygden (NAV), sum fólk á norska arbeiðsmarknaðinum rinda inn til, er partvíst ein heilsutrygdarlíknandi skipan og partvíst pensjón. Samlaða gjaldið er 8,2 prosent av lønarinntøkuni, men tað er ikki møguligt – tað er komið fram í fleiri rættarmálum – at skilja ímillum, hvussu stórur partur er hvat.

Ein partur av umrøðuni av hesum málinum hevur verið, at pensjónsparturin verður goldin inn av skattaðum pengum og aftur verður skattaður, tá hetta verður rindað út.

Hetta er ikki galdandi fyri kravdu persónligu pensjónsuppsparingarnar í Føroyum, men er líknandi støða sum við arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldinum (Samhaldsfasta), sum bæði verður skattaður við inn- og útgjald.

Meirilutin staðfestir, at tað grundleggjandi er torført at samanbera støðuna hjá fólkum, sum arbeiða á ymiskum arbeiðsmarknaðum, tí hesar skipanir eru sera ymiskar frá landi til lands. Spurningurin er eisini, í hvønn mun tað er rætt ella yvirhøvur gjørligt at seta skipanir í verk, sum javnseta støðuna hjá øllum fólkum, sum búgva í Føroyum, tá tey arbeiða á sera nógvum ymiskum arbeiðsmarknaðum.

Undir viðgerðini av hesum málinum hava ymisku hoyringarpartarnir í høvuðsheitum umrøtt fýra bólkar, umframt sjófólk, sum búgva í Noregi og sigla við norskum fiskiskipum: (1) búsitandi í Føroyum, sum arbeiða á landi í Føroyum, (2) búsitandi í Føroyum við føroyskum fiskiskipum, (3) búsitandi í Føroyum við norskum skipum og (4) búsitandi í Føroyum í frálandavinnuni í Noregi.

Tað er greitt, at bólkur 4 í høvuðsheitum rindar munandi minni skatt enn hinir bólkarnir, samstundis sum tað eisini er greitt, at hesi bæði verða fevnd av NAV og Heilsutrygd, hóast tey í framtíðini fara at verða frítikin fyri gjald til Heilsutrygd.

Sjófólk, búsitandi í Noregi og sum sigla við norskum fiskiskipum, verða grundleggjandi minni skattað enn fólk búsitandi Føroyum.

Hinir tríggir bólkarnir eru í einari meira samanberiligari støðu, hóast hon eisini er torfør at samanbera. Í útrokningum hjá Fíggjarmálaráðnum, sum send er nevndini, er útgangsstøðið tikið í 2026, tá skattaumskipanin hevur fingið fullan virknað, við einari árligari inntøku á 750.000 kr. – sum er lutfalsliga vanligt við fiskiskipum – við kirkjuskatti og einum miðal kommunuskattaprosenti.

Í einari slíkari støðu rinda tey á vanliga arbeiðsmarknaðinum í Føroyum (bólkur 1) kr. 292.450 í lands-, kommunu- og kirkjuskatti tilsamans, meðan gjøldini til ALS, AMEG, Heilsutrygd, barsilsskipan og Kringvarp tilsamans eru kr. 43.540.

Búsitandi í Føroyum við føroyskum fiskiskipi (bólkur 2) rinda kr. 271.198 í lands-, kommunu- og kirkjuskatti tilsamans, sum orsakað av frádrátti fyri fiskiveiðu er nakað minni enn tey á landi, og hetta hevur somuleiðis ávirkan á summi av gjøldunum, so tey tilsamans blíva kr. 41.625.

Búsitandi í Føroyum við norskum fiskiskipum (bólkur 3) fáa umframt frádráttin fyri fiskiveiðu eisini samdøgursfrádrátt, ið hevur við sær, at skatturin til land, kommunu og kirkju tilsamans verður kr. 262.090.

Av gjøldunum í Føroyum kunnu hesi, tá lógaruppskotið um heilsutrygd, sum er í tinginum, er samtykt, verða frítikin fyri øll gjøld uttan Kringvarp, sum er kr. 2.040 um árið.

Umframt hetta kemur so NAV, sum í hesum førinum verður kr. 58.500.

Gjøldini hjá føroyingum við norskum fiskiskipum til Føroyar verða sostatt minni enn hjá teimum, sum arbeiða í Føroyum ella á føroyskum fiskiskipum, meðan samlaða upphæddin fyri skatt og gjøld er nakað hægri enn hjá fiskimanni við føroyskum skipi; nevniliga kr. 322.630 kr. tilsamans í skatti og gjøldum fyri tann við norskum fiskiskipi og kr. 312.823 í skatti og gjøldum fyri tann við føroyskum fiskiskipi.

Greitt er tó, at NAV skipanin sum heild er ein skipan, sum betur tekur hond um tey, sum rinda enn tær skipanir, sum eru í Føroyum og kosta nakað minni, samstundis sum tey, ið rinda inn til NAV, framvegis hava rættindi í Heilsutrygd.

Føroyskir fiskimenn uttanlands eru fult skattskyldugir í Føroyum og eru tí í aðrari støðu enn teir bólkar, sum ikki fáast við fiskiveiðu. Hesi verða í høvuðsheitum skattað á sama hátt sum fólk við fiskiveiðuinntøku í Føroyum, samstundis sum samdøgurfrádrátturin komandi árini verður minkaður munandi. Tó er støðan soleiðis sambært norðurlendsku konventiónini, at løntakari rindar sosial gjøld í landinum, har størsta lønarinntøkan verður forvunnin; tí kunnu føroyingar við norskum fiskiskipum ikki velja gjald til NAV frá út frá eini hugsan um, at tað gjaldið er hægri enn tað, sum goldið verður til sosial gjøld í Føroyum.

Vitandi, at skattakrónur av uttanlandsinntøku eru eitt munandi íkast í føroyska landskassan, eins og lønirnar eru tað í samlaða búskapin, heitir meirilutin á Fíggjarmálaráðið um at halda eyga við, um fleiri av teimum, sum arbeiða ella arbeiddu sum fiskimenn uttanlands við skattskyldu í Føroyum (ella við skipanum, har Føroyar fáa ella fingu part av lønarskattinum), flyta yvir í DIS, NIS og líknandi skipanir, har landskassin ikki fær lut í eini einastu skattakrónu, so at finnast kann tann rímiliga javnvágin viðvíkjandi skatti og avgjøldum, har stóra føroyska arbeiðsfjøldin uttanlands – serstakliga hon, sum hevur fiskiveiðu sum arbeiðsmarknað, og sum er fult skattskyldug í Føroyum – framhaldandi verður eitt munandi samlað íkast í føroyska búskapin uttan tó at skeikla føroyska arbeiðsmarknaðin.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Beinir Johannesen, Magnus Rasmussen og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Fyri jól varð ásetingin í § 154 b í skattalógini strikað.

Hetta merkti, at inngjald til norska Folketrygden (NAV) ikki longur verður roknað sum ein skattur. Henda skipan kom annars upprunaliga í skattalógina í 2012, og varð tá einmælt samtykt av øllum flokkum í Løgtinginum.

Nógvir føroyingar, sum arbeiða uttanlands, eru noyddir at rinda til Folketrygden. Inngjaldið er 8,2% av lønini. Hendan trygging dekkar eina rød av umstøðum, men stórur partur er eftirløn. Felags fyri øll útgjøld, eisini eftirløn, er galdandi, at tey eru skattskyldug við útgjald.

Síðan broytingina fyri jól er upplýst fyri nevndini, at fleiri hava valt at flyta bústað og onnur eru farin í aðrar skipanir. Serliga rakar broytingin hart fiskimenn uttanlands, ið hava fingið ein munandi inntøkumiss. Fiskimenn uttanlands eru skattskyldugir í Føroyum.

Broytingin fyri jól skuldi vera við til at fíggja skattaumskipanina hjá landsstýrinum, men tekur verandi gongd ferð á seg – har borgarar flyta av landinum ella fara í aðrar skipanir, har man ikki er skattskyldugur í Føroyum – missir landskassin inntøku, og umskipanin verður ei heldur fíggjað.

Broytingin ger eisini, at vit fáa ein minni fleksiblan arbeiðsmarknað, og er tað ikki gott fyri føroyska búskapin í longdini.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 15. mai 2024

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	